# Lítil áhugi fyri tónleik



Mikkjal Gaard Hansen fylti allan pallin út við síni útstráling og rødd og í frálíka ljósinum, sá framførslan gott út



**Rættiliga fitta av fólki var komið saman í Ítróttarhøllini á Hálsi, tá Kyndil skipaði fyri árligu Nýggjárs-konsertini. Tónleikurin var góður, men áhugin fyri honum var lítil.**

NÝGGJÁRSKONSERTIN
Orð & myndir: Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Sic, The Story Ends, 200 og The Dreams her var talan um 4 av mest spennandi nøvnunum á føroyska tónleikapallinum, men ikki fyri áskoðarafjøldina, ið nærum einans taldi ung fólk, sera ung fólk. Onkur hendinga áskoðari mundi vera yvir 18 ár, men hesir kundu teljast á einari hond. Tað var eingin ivi um, at høvuðsendamálið hjá teimum flestu var at blíva full, sera full sera skjótt og hetta eydnaðist til fulnar.

Longu áðrenn fyrsti bólkurin var farin av pallinum vóru fyrstu fólkini avdottin, eitt par var í ferð við at fáa sær eitt lítið upp ímóti einum veggi, og fyrstu buldrini av fýrverkið høvdu ljóðað í høllini.

Bólkarnir framførdu allir sera væl, men tað var fyrst og fremst plátuvendarin DJ Switch, ið fylti gólvið. Fýrverkið merkti sum vant konsertina, men talan var bert um ein ótanga, hesin var lukkutíð ikki av teimum gløggastu. Hann sat aftan fyri ein stólpa uppi móti vegginum og kastaði fýrverk niður á sama stað á hallargólvinum, tí var lætt hjá vaktarfólkinum at finna hann. Rættiliga harðliga varð hann drigin út og smitaður fyri dyr.

## Sic spældi útum pallkantin

Frálíka framførslan hjá Sic var í heimsflokki og savnaði ein tættan lítlan skara av trúføstum Sic-høvdum framman fyri pallin. Hesi hugnaðu sær væl, men millum størsta partin av áskoðarunum var eingin áhugi, enntá var tað onkur, ið vísti sína ónøgd við tunga og harða rokkin, við at venda tummilin niðureftir og rópa ókvæmisorð eftir teimum. Hetta tók tó einki frá framførsluni.

Oddamaðurin Mikkjal G. Hansen var sum altíð ein orkubumba og hansara innilígheit er nærum ófatilig. Tó kundi man væl livað við tí, um hann valdi at tiga millum løgini, tí hansara viðmerkingar eru satt at siga flatar. Men meðan tónleikurin buldraði fyltu rødd og persónligheit pallin heilt út og komu langt út um pallkantin. Tað gjørdi restin Sic eisini, bólkurin gav seg 200% og veggurin av ljóði rakti teg hart í andlitið. Har var eingin møguleiki fyri at vera líkaglaður, antin dámdi tú tað ella ikki.

Ljóðið var sum heild gott, tó kundi tað vera eitt sindur ringt á at skyna ymisku ljóðføríni, og ljóðmyndin var eitt sindur runut í støðum. Men hetta er ofta vandin við hesum slagi av tónleiki. Serliga trupult er at fáa gott ljóð í eini høll sum hesi, har ljóðið slær aftur. Eisini vóru trupulleikar við ljóðinum í tí eina gittaranum og hetta kendist eitt sindur forstýrandið.

Tað var tó lekkurt at uppliva, at Kyndil hevði brúkt pening upp á ljós og ljóð. Tí hesin parturin var veruliga góður í ár. Ljósmaðurin skapti alt kvøldið vakrar pallmyndir og hetta gav framførslunum ein professionellan dám.

## Orsaka at vit eru til

The Story Ends var næsti bólkur á pallin, og nú vóru uppaftur fleiri fólk inni í høllini. Eg havi tað eitt sindur trupult við The Story Ends. Havi ummælt bólkin rættiliga ofta, og niðurstøðan er altíð tann sama, at hetta er ein lovandi bólkur. Hetta, at The Story Ends er ein lovandi bólkur, kann ikki setast spurnartekin við. Teir eiga nøkur sera fangandi løg, men bólkurin útstrálaði eina sera ósjarmerandi blanding av tveimum so ólíkum kenslum sum líkasælu og fjáltri. Limirnir í bólkinum eru ungir, og hava eina spennandi framtíð frammanfyri sær. Tað er ivaleyst tí, at bólkurin somikið skjótt er vorðin eitt so stórt navn, at man krevur dekan ov nógv av so óroyndum monnum. Sangarin er ein vakur ungur maður við góðari rødd, hann hevur eina natúrliga fangandi útstráling, men virkaði sera ótryggur millum sangirnar, og hansara tóma "Takk fyri!" millum hvørt lag, ljóðaði meira sum orsaka vit eru til, enn nakað annað. Alt bleiv eitt sindur innanhýsis kent. Limirnir stóðu og smáprátaðu millum løgini og sóu veruliga ikki út til at hugna sær. Hetta var bara eitt sindur for ótjekka. Tað slagið av rokki, sum The Story Ends spælir verður vanliga spældur við nógvum sjálvsáliti, men hetta sjálvsálit



Nógv fólk var komið sama[n] Nýggjárskonsertini